# Føroyar fingu altjóða viðurkenning

**Føroyska ferðavinnan gjørdi rætiliga vart við seg á stórari ferðavinnustevnu í Berlin seinasta vikuskifti. Føroyingar fngu tvær virðislønir fyri film og gongufaldara**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Føroyska ferðavinnan gjørdi vart við seg á stevnu í Berlin um vikuskiftið. Føroyingar fingu tvær virðislønir umframt nógva fjølmiðlaumtalu, sigur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya.

Føroyska ferðavinnan hevur á ferðavinnumessuni í Berlin fingið virðisløn fyri ein ferðavinnufilm, og fyri ein faldara um gongutúrar í Føroyum.

Ferðavinnustevnan, sum hildin hevur verið í Berlin um vikuskiftið, er afturvendandi tiltak, sum í nógv ár hevur verið hildin um hesa tíðina, greiðir Heri Niclasen frá. Føroyar hava eisini verið umboðaðar í mong Harrans ár á hesi stevnuni, sigur hann.

Stevnan er bæði fyri ferðvinnufólk og fyri almenningin, sum fær høvi at vitja ymsu básarnar. Fríggjadagin til sunnudagin vóru almennir dagar, ella publikumsdagar, sum Heri Niclasen tekur til. hann sigur, at tað vóru nógv fólk og vitjaðu føroyska básin hesar dagarnar.

Mánadagin og týsdagin vóru tað so tey professionellu, sum áttu stevnuna, sigur Heri Niclasen. Tá hittust fólk at tosa saman, síggja tilfar hvør hjá øðrum og gera avtalur um keyp og sølu fyri komandi ár.

– Tí tað, sum avgreiðast skal í ár, er longu gjørt. Nú tosa vit um 2005, sigur Heri Niclasen. Tað nyttar einki at koma við nøkrum faldarum ella lýsingum nú, um tú ætlar at fáa nakað burtur úr summarinum 2004. Tað er longu langt síðan selt.

Ferðaráð Føroya lat inn ein stuttan film um Føroyar til ferðavinnumessuna, greiðir Heri Niclasn frá. Ein filmur við myndum og ljóði. Brot út honum hava veri víst i SvF nakrar ferðir. Landslagsmyndir úr Føroyum og eitt nú føroyskur dansur úr Norðurlandahúsinum. Tað er Herluf Sørensen, sum hevur skipað filmin.

Filmurin vann fyrstu virðisløn framman fyri ein danskan film um »Øresundsregionen« og ein svenskan film um Stockholm, sigur Heri Niclasen.

Gongufaldari, sum Birita Nolsø á Ferðaráðnum og Randi Meitil gjørdu í fjør, varð við í eini kapping um besta faldaran á stevnuni. Og har fingu føroyingar eitt triðjapláss, sigur ein heldur enn ikki errin Heri Niclasen.

Umframt Ferðaráðið luttóku eisini Atlantsflog og Smyril Line á stevnuni í Berlin. Føroyingar høvdu tíðindafund sunnudagin, og eini 50-60 tíðindafok vóru á fundinum, sigur Heri Niclasen, sum fegnast um áhugan fyri Føroyum.

– Tað merkist eisini á slíkum stevnum, at ófriðurin nærast okkum, sigur Heri Niclasen og sipar til bumburnar í Madrid. Tað er greitt, at ein slík stevna, har eini 10.000 fólk eru samankomin, er eitt upplagt terroristmál. Og eg má viðganga, at eg fyri fyrstu ferð nakrantíð beinliðis gekk og hugsaði um hetta á hesi messuni, sigur hann.

Ferðavinnustevnan hevði eisini hóttanina rímiliga nær. Tí meðan messan var, varð stóra Tegel floghavnin í Berlin stongd júst orsakað av yvirgangshóttan.

Tað verða onkrar stórar ferðavinnustevnur aftur í næstum, sigur stjórin á Ferðaráðnum. Men Ferðaráðið verður ikki við á nakrari slíkar stevnu, fyrr enn Vestnorden Travel Mart verður í Reykjavík í september.



*Ferðaráð Føroya hevur fingið virðislønir fyri ein film og hendan gongufaldaran á ferðavinnustevnu í Berlin um vikuskiftið. Birita Nolsøe hevur fyri Ferðaráðið staðið fyri faldaranum saman við Randi Meitil*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tryggingin liðugt umbygd

**Drúgva umbyggingin á Kngabrúnni er nú liðug, og Tryggingarfelagið fer um páskirnar at savna alt virksemi sítt í Havn á Kongabrúnni og í Quillingsgarði**

UMBYGGING
*Edvard Joensen*


*Umfatandi umbyggingin, sum í eini fimm ár hevur ávirkað feðrsluna kring Tryggingina, er nú liðug, og Trygingarfelagið fer at savna alt sítt virksemi á Kongabrúnni og har á leið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Umbyggingin av hølunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar á Kongabrúnni, sum hevur staðið við síðan 1999, er nú liðug, og á páskum verður væntandi alt virksemið savnað við Kongarbúnna.

Tað hevur verið drúgt at komið er til, sigur Mortan Poulsen, stjóri á Tryggingarfelgnum Føroyar. Tryggingin hevur hildið til í ymsum bygningum ymsastaðni í býnum. Og minni enn so allir hava verið gjørdir til slíkt virksemi, so umbygging hevur verið dagligur kostur hjá tryggingarfólki í áravís, sigur hann.

Hendan seinasta umbyggingin, sum millum annað umfatar Geilina, ið er bygningurin, har Føroya Gjaldstova í síni tíð helt til, umframt bygningin hjá Niels L. Arge á Kongabrúnni, hevur staðið við í eini fimm ár samanlagt. So tað er skilligt, at tey nú gleðast um, at vera komin á mál, sigur Mortan Poulsen.

Um páskirnar verða væntandi tey umleið 100 fólkini, sum arbeiða hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Havn, savnað á Kongabrúnni. Tá flyta umleið 40 fólk úr bygninginum, sum Tryggingarfelagið eigur á Hálsi, oman á Kongabúnna. Tryggingin brúkar umleið 1.200 fermetrar av tí 3.000 fermetra stóra bygninginum á Hálsi. Restina leiga ALS og fútin, sigur Mortan Poulsen. Tryggingarfelagið fer nú at royna at leiga tann partin, flutt verður úr, út, sigur hann.

Umframt tey 100 fólkini í Havn, arbeiða umleið 20-25 fólk á fimm deildum hjá Tryggingarfelagnum kring landið.

Parkeringsviðurskiftini eru ikki góð í grannalagnum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Sjávlt eigur felagið ikki parkeringspláss til fólkini, sum arbeiða hjá felagnum. Minni enn so. So tey mugu seta sínar bilar ymsastaðni, har pláss er, sigur Mortan Poulsen. Onkur parkerar á Glaðsheyggi, og onkur annar á Skálatrøð ella har, eitt pláss kann finnast.

Parkeringsplássini á Kongabrúni framman fyri Tryggingini eru tíðaravmarkað, so har ber ikki til hjá fólki, sum er til arbeiðis, at seta bilin. Men kundarnir fáa altíð parkeringspláss har, vísir Mortan Poulsen á.



# Heimføðisligur ótti fyri útlendskum kapitali

**– Bíðipolitikkurin seinastu fimm árini við ikki at fremja skilnað millum alment og privat hevur saman við heimføðisligum ótta fyri útlendskum kapitali forðað fyri nýskapan og máttmiklum vinnuligum framburði í Føroyum, sigur Menningarstovan**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


*Okkurt er kortini hent. Bøtt er munandi um undirstøðukervið í Føroyum, og vit eiga at vænta okkum nógv av komandi tunnilssambandinum til Norðoyggjar, heldur Kjartan Kristiansen*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Menningarstovan heldur eftir øllum at døma ikki, at landsstýrið, sum sat undan hesum, framdi nakrar kollveltingar á vinnupolitiska økinum. Hetta kemur fram í ársfrágreiðingini hjá stovninum, sum júst er almannakunngjørd.

– Seinastu fimm árini hava verið merkt av »politiskari semju« um at bíða við at fremja skilnað millum alment og privat. Gerð av álitum um einskiljing og partabrævamarknaður hava verið nýtt sum undanførsla fyri ikki at fremja henda skilnað, sum vinnupolitikkurin leggur upp til, og sum gongur við risaferð í okkara samstarvslondum.

Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni, sigur, at úrslitið av hesum bíði-politikki hevur forðað fyri nýskapan og nýskiping av føroyskum vinnulívi og harvið fyri máttmiklum vinnuligum framburði seinastu fimm árini.

– Uttan mun til, um vit hava skipað »almenna partin« av vinnulívinum í partafeløg og sjálveigandi stovnar, verða hesar fyritøkur kortini ikki mettar sum fult vinnuligir samstarvspartar uttanlands. Almenni áhugin er eyka váði. Hann avmarkar, hvussu nógv útlendskir samstarvspartar tora at binda seg til føroyskar fyritøkur.


*– Føroyska samfelagið hevur verið uttan tann íblástur, sum nýggjur kapitalur og nýggjar, ungar vinnukreftir uppá gott og ilt kundu givið, heldur Kjartan Kristiansen*

## Ótti fyri kapitali

Stjórin á Menningarstovuni sigur í ársfrágreiðingini, at ein onnur forðing fyri nýskapan og nýskiping er tað, hann kallar heimføðisligi óttin fyri kapitali og serliga fyri útlendskum kapitali.

– Kapitalur hevur síni egnu einføldu áhugamál. Hann fer har, vinningur og trygg vinnulig viðurskifti eru. Eru hesi kappingarfør í Føroyum, leitar hann ikki burtur. Kapitalur hevur ikki so mong og mógtsigandi áhugamál. Hann metir bert um lívføri og útlit – ella sagt við øðrum orðum; hann metir um møguleikarnar fyri framburði og trivnaði.

Kjartan Kristiansen sigur, at nevndu forðingar hava elvt til, at íborin máttur í føroyska samfelagnum hevur ligið niðurbundin av politiskum skipanum og gomlum strukturum.

– Samfelagið hevur verið uttan tann íblástur, sum nýggjur kapitalur og nýggjar, ungar vinnukreftir uppá gott og ilt kundi givið.

## Okkurt kortini…

Men okkurt er kortini hent, heldur Menningarstovan.

– Eydnast hevur at bøtt munandi um undirstøðukervið, og vit eiga at vænta okkum nógv av komandi tunnilssambandinum til Norðoyggjar. Kapping er komin innan telesamskifti við munandi betri samskiftismøguleikum úteftir. Vit fara vónandi at síggja nýggj frambrot innan KT-vinnu í Føroyum – og tá serliga um almenni mastodonturin innan hesa vinnu, Elektron, gerst vinnuligur, og um føroyskar KT-fyritøkur sleppa framat at royna seg við nýggjum uppgávum í Føroyum.

Kjartan heldur, at hóast vit á nógvum økjum enn ikki hava megnað at gjørt okkara regluverk í samsvari við altjóða regluverk, gongur rætta vegin.

– Heilsufrøðiliga avtalan við ES er eitt tað týdningarmesta stigið, sum er framt á hesi leið. Hetta er í roynd og veru einasta munagóða stigið, ið tikið er síðan sáttmálin við ES kom í gildi í 1992. At Føroyar verða fevndar av al-evropeiska upprunaøkinum, 1. januar 2005, er vónandi eitt annað týdningarmikið stig.

Menningarstjórin heldur, at skærastu glottarnar um føroyskt kappingarføri hava vit kortini sæð innan kreativar vinnur í seinastuni.

– Eg hugsi í hesum sambandi um tónleik, myndlist, bókmentir og design í rúmari merking, sigur stjórin á Menningarstovuni, Kjartan Kristiansen.

Kjartan Kristiansen, Menningarstovan:

# - Tað almenna liggur sum ein »dýna« omaná nógvum virksemi kring landið

**- Virkisfúsar kreftir sleppa ikki í nóg stóran mun framat, tá ið tað almenna – antin so ella so – er uppí fyritøkum og stovnum , sigur Kjartan Kristiansen**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kjartan Kristiansen heldur, at ein stórur trupulleiki hjá føroyskum vinnulívi er, at allir politiskir flokkar tosa um at einskilja, men eingin hevur gjørt nakað veruligt við hetta.

– Tað mest týdningarmikla, sum skal henda, er, at tað almenna verður tikið burtur úr øllum vinnulívi.

Hann sigur, at tað er ógvuliga umráðandi, at virkisfúsar kreftir – ung sum eldri, ið vilja royna seg, sleppa framat. Tað sleppa tær ikki í nóg stóran mun, tá ið tað almenna – antin so ella so – er uppí fyritøkum og stovnum.

– Eg hugsi ikki bara um fólk við útbúgvingum, men eisini um vanliga føroyingin, sum vil royna seg. Tað er jú eingin, sum sigur, at tað bert eru tey við útbúgvingum, sum kunnu skapa nakað.

Kjartan vísir á, at Føroya Fiskavirking er eitt felag, sum ikki er undir vanligari privatøkonomiskari stýring.

– Tað er eingin, sum setir felagnum nóg stór krøv um stýring, avlop og hvørt av sínum.

Hann sigur, at tað almenna liggur sum ein dýna omaná feløgum og stovnum kring um landið.

Kjartan nevnir Elektron, sum ikki kann roknast fyri at vera ein vinnulig fyritøka, tá ið hon ikki skal hava yvirskot.

– Felagið er ikki vinnuligt í tann mun, tað átti at verið, tá ið bankar, sparikassar, tryggingin og tað almenna eiga Elektron, sum liggur omaná einum hópi av uppgávum, sum eingin sleppur framat – ei heldur at kappast um, sigur hann.

Úr rúgvuni nevnir Kjartan eisini Føroya Tele, sum nú er partafelag.

– Men er felagið privat fyri tann skuld, at tað roynir at tjena pengar, spyr hann og vísir á, at Føroya Tele er undir stýring.

–Allan vegin ígjøgnum hava vit feløg og stovnar, sum tað almenna antin beinleiðis ella gjøgnum grunnar og annað eigur lut í, sigur stjórin á Menningarstovuni, Kjartan Kristiansen, í stuttari viðmerking.